Ítróttar
Sosialurin
Nr. 87 • fríggjadagur • 5. mai 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Spildurnýtt lógarverk til føroyskan fótbólt

**Ein tann sjónligasta broytingin í nýggju FSF-lógunum verður, at mannagongdin við kærum verður broytt, og at kappingarnevndin framyvir bert skal fáast við sjálva fótbóltskappingina**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Leygardagin hevur Fótbóltssamband Føroya eykaaðalfund. Fundurin varð sum so fráboðaður, longu tá regluligi aðalfundurin varð hildin í februar mánaði, og fremsta málið á skránni er nýggja lógarverkið, sum ætlandi skal vera galdandi fyri føroyska fótbóltsheimin.

Altjóða fótbóltsfamiljan - UEFA og FIFA - hava nevnliga leingi arbeitt við at standardisera lógarverkið fyri øll limalondini, og tí er tað mest sum eitt krav, at føroyskur fótbóltur eisini gongur undir hesi, um vit framvegis vilja vera partur av fína selskapinum.



*Altjóða fótbóltsfamiljan - UEFA og FIFA - hava leingi arbeitt við at standardisera lógarverkið fyri øll limalondini, og tí er tað mest sum eitt krav, at føroyskur fótbóltur eisini gongur undir hesi, um vit framvegis vilja vera partur av fína selskapinum*

### Alt ella einki

Tá lógarbroytingar áður hava verið á skránni, hevur mannagongdin aloftast verið tann, at ein lógargrein í senn hevur verið til viðgerðar, men soleiðis er ikki hesaferð. Talan er nevnliga als ikki um einstakar broytingar, sum nú verða framdar, men eitt heilt nýtt lógarverk, og tí verður alt hetta sett til atkvøðugreiðslu undir einum.

Tað kann kanska tykjast sum ein møtumikil støðutakan hjá feløgunum, men hetta kemur tó neyvan sum nakað sjokk fyri hesi, kortini. Málið var frammi longu á aðalfundinum fyri góðum ári síðani, og á fundum við formenninar í feløgunum hevur FSF eisini kunnað um, hvørja ávirkan nýggju reglurnar fáa.

### Broyttir kæruvegir

Fyri føroyska fótbóltsáskoðaran verður talan tó ikki um tær stóru broytingarnar. Reglurnar í spælinum á vøllinum verða framvegis tær somu, og hvørki støða á málum ella vøllum verða ávirkað av hesum.

Hjá teimum, sum dáma væl at fylgja við í tí, sum fyriferst kring fótbóltin, verður tó ein rættiliga sjónlig broyting. Í øllum førum sjónligt, um arbeiðið hjá Kappingarnevndini eisini framyvir verður so møtumikið, sum tað hevur verið fyrsta mánaðin av hesum kappingarárinum.

Sambært nýggju reglunum, so verður arbeiðssetningurin hjá sjálvari Kappingarnevndini nevnliga avmarkaður framyvir, soleiðis at hesin bert fevnir um tað at skipa fyri og at umsita sjálva kappingina.

At viðgera kærur verður ein nýggj nevnd, aðalnevnd/disciplinærnevnd, stovnssett. Limirnir í hesari verða valdir av aðalfundinum, og verður tað soleiðis ikki FSF-nevndin, sum av sær sjálvari mannar hesa. Umframt at taka støðu til kærumál av ymsum slag, so fær hendan nevndin eisini disciplinærar heimildir, og kann hon tí revsa eitt nú brot á góðum ítróttarsið, feløg sum ikki halda sínar skyldur o.s.fr.

Eisini dómsnevndin hvørvur sambært nýggju reglunum. Í hennara stað kemur ein kærunevnd, og allar avgerðir hjá hesari verða endaligar. Somikið endaligar, at avgerðir hjá hesari heldur ikki kunnu kærast til ítróttardómstólin hjá FSF. Er talan hinvegin um mál, sum raka altjóða partin av føroyskum fótbólti, so kunnu avgerðir tó kærast til ítróttardómstólin í Lausanne.

### Mugu akta FIFA

Tað er tó sjávlandi ikki, fyrr enn aðalfundurin hevur tikið endaliga støðu, at tað fyriliggur nøkur vissa um, hvørt føroysku feløgini taka undir við nýggja lógarverkinum.

Ivaleyst verður eisini drúgt orðaskifti um hetta, men spurningurin er kortini, hvørt feløgini hava nakað val. FIFA hevur seinastu tíðina strongt á, fyri at fáa standard-reglurgerðir fyri øll limalond, og freistin at senda hesar inn til góðkenningar, er nú um at vera runnin. Og skal føroyskur fótbóltur framhaldandi vera partur av altjóða fótbóltsfamiljuni, so er neyvan hugsandi, at svarið til nýggja lógaruppskotið verður eitt hampuliga greitt ja.

## Raðfylgja og flytingarvindeyga

Umframt at samtykkja nýtt lógarverk, verða eisini tvey onnur mál fyri á eykaaðalfundinum hjá FSF.

Bæði eru mál, sum vóru fyri á seinasta aðalfundi, men feløgini mettu tá, at meira tíð var neyðug, áðrenn støða kundi takast, og tá eykaaðalfundur kortini skuldi haldast, vórðu málini flutt.

Í øðrum førinum snýr tað seg um, hvussu raðfylgjan á liðum skal roknast, tá tað stendur á jøvnum í stigum. Her hevur reglan seinnu árini verið, at stig í innanhýsis dystum skulu vera avgerandi, men av misgávum varð tá gloymt at taka mál - og møgulig útivøllarmál við í uppgerðina. Tað vildi kappingarnevndin broyta, men samstundis kom ynski um, at lógin heldur skuldi vera eftir gamla roknihættinum. Altso at málmunurin varð roknaður fyrst, síðani skotin mál, og ikki fyrr enn tað stendur í jøvnum í hesum, skulu innanhýsis dystir roknast.

Hitt málið snýr seg um sonevnda flytingarvindeygað. Hetta skal sambært altjóða reglum ásetast, men ymsu tjóðarsambondini hava tó eina ávísa fríheit í hesum, og tað er tann spurningin, sum FSF nú skal greiða.

**-mørk**

## FSF flytur frá ÍSF

Ein partur av nýggja lógarverkinum hjá FSF inniber, at tey ikki longur geva seg undir allar lógir hjá ÍSF. Hetta hevur annars verið ein av grundleggjandi reglunum innan føroyskan ítrótt, síðani sersambondini vórðu sett á stovn fyri 27 árum síðani.

Men við nýggju lógarheimildu num, sum fótbólturin nú gevur sær sjálvum, fær ÍSF at kalla einki orð at siga innan føroyskan fótbólt. Formliga innibera reglurnar eisini, at fótbóltsfeløgini nú í fyrst u atløgu eru limir í FSF, og gjøgnum FSF eisini limir í ÍSF. Ein raðfylgja, sum áður hevur verið tann øvugta.

**-mørk**

## ÍSF á vegamóti

Tað nervar ikki ÍSF-forsetan, Heðin Mortensen, at FSF møguliga tekur eitt fet burtur frá ÍSF leygardagin.

– Hetta vísir sum so bara, at ÍSF er komið móti enn einum vegamóti. Eg var sjálvur har, tá felagsskapurin í 1979 varð umskipaður, soleiðis at vit ístaðin fyri ymsu deildirnar fingu sersambond, sum varaðu av ymsu ítróttagreinunum. Tað er ein leistur, sum hevur virkað toluliga væl síðani, men einki stendur í stað. Og hetta er ikki annað enn ein náttúrlig gongd at fara. Fótbólturin má eins og øll onnur fylgja altjóða rákinum, og eg ivist ikki í, at sum frálíður verður gongdin tann sama innan aðrar ítróttagreinar.

–Og hetta er eisini nakað, sum vit hava vitað av. So talan er á ongan sum helst hátt um nakra ósemju millum fótbóltin og restina av føroyskum ítrótti.

*Men skapar hetta ikki ein vandi fyri, at leiklutur hjá ÍSF spakuliga hvørvur?*

– Tað hvørki vóni ella vænti eg. Hóast sambondini hvør í sínum lagi gerast alt meira sjálvstøðug, so eri eg sannførdur um, at vit framvegis hava tørv á einum góðum samanhaldi. Tað kann verða, at okkara leiklutur broytist nakað, men tað fer helst altíð at vera tørvur á tí felags talurørið, sum ÍSF eigur at vera, sigur Heðin Mortensen.

**-mørk**